VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin p/f
Skansavegur 7
Postboks 1010
FO-110 Tórshavn

Tel +298 350200
Fax +298 350201
www.vagatunnilin.fo

# Frágreiðing
# til aðalfundin 26. juni 2003

**(fyri árið 2002)**

Til ársaðalfundin tann 26. juni 2003, er fylgjandi greitt:

- tunnilin varð latin upp fyri ferðslu 10. dec 2002, uml. 6 mánaðar fyrr enn ásett í tíðarætlanini
- arbeiði, sum restaðu í, tá ið tunnilin varð latin upp fyri ferðslu, eru um at vera liðug
- ferðslan í tunlinum er uml. 800 bilar/dag, ið er umleið tað dupulta av tí, sum varisliga varð mett framman undan
- samlaða íløgan verður uml. 285 mió kr

**1. Nevndin og felagið**
Nevndin hevur í 2002 havt 16 fundir og 6 fundir higartil í ár.

Nevndin hevur síðani apríl 1999 havt 5 limir. Á seinasta aðalfundi var øll nevndin afturvald.

Felagið hevur egna skrivstovu í leigaðum hølum á Skansavegi 7. Raksturin er skipaður í samstarvi við p/f Norðoyatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Starvsfólkini hava í 2002 verið 4 í tali umframt stjóran. Av hesum hava 2 verið knýtt til dagliga eftirlitsarbeiðið, meðan 1 burturav hevur verið knýtt til arbeiðið við Norðoyatunlinum. 1 verkfrøðingur er farin úr starvi meðan 1 fíggjarfólk er sett í staðin.

Partapeningurin var seinast hækkaður á eykaaðalfundi 29. januar 2003, so at partapeningurin nú er 120,3 mió kr.

## 2. Virksemi
Felagið hevur í 2002 hildið fram við undirsjóartunnilsgerð millum Streymoynna og Vágoynna. Tunnilin varð latin upp fyri ferðslu 10. dec 2002, og hevur felagið síðani staðið fyri rakstrinum av tunlinum. Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

### -Tunnilsarbeiðið
Við ársbyrjan 2002 vóru 2828 m av tunli sprongdir frá Leynum og 1967 m av tunli sprongdir úr Vágum. Eftir vóru 82 m og var hetta nakað betri enn ætlað.

Stutt eftir ársskiftið, tann 10. jan 2002 varð tunnilin skotin ígjøgnum. Hetta varð hátíðarhildið við samkomu í tunlinum og við borðhaldi um kvøldið fyri gestum, m.a. umboð fyri arbeiðstakararnar, landstýrið, løgting, kommunur og onnur.

Í juli 2002 kunngjørdi nevndin, at tunnilin fór at vera latin upp fyri ferðslu fyrr enn ætlað og dagurin varð ásettur til 26. nov 2002.

Tað vísti seg tó, at tekingin í tunlinum gjørdist væl meira umfatandi, enn tað roknað varð við, tá ið upplatingardagurin varð kunngjørdur. Hóast tunnilin er sera tættur – samlaði lekin er knappar 500 l/min í mun til ásetta kravið uppá 1500 l/min – hevur tað víst seg, at hellan er so háttað, at nógvir smærri, spjaddir lekar eru, sum hava kravt umfatandi teking. Hetta tarnaði eisini øðrum arbeiðum, sum gerast skuldu í tunlinum.

Við at framskunda mest neyðtúrviligu partarnar av el-arbeiðinum, eydnaðist tó at fáa tunnilin kláran til at lata upp fyri ferðslu 10. dec 2002, umleið 6 mánaðar fyrr enn ásett í tíðarætlanini.

Eftir at tunnilin er latin upp fyri ferðslu, hevur verið arbeitt um næturnar við teimum arbeiðum, sum eftir vóru.

### - Vegarbeiðið
Í Vágunum var við ársbyrjan 2002 endaligi vegurin bygdur upp undir áskotið, brúgv gjørd um Marknará eins og skráningar, tvørrennur og seyðasmogur vóru mestsum lidnar. Eftir var at gera svingið oman fyri Fútaklett og bíðaði hetta arbeiðið til veturin var av.

Í Leynum var við ársbyrjan so smátt komin gongd á vega- og brúgvagerðina.

Vegaarbeiðini í Vágum og í Leynum vóru liðug í november 2002. Eftir er upprudding og hamping, sum hevur bíðað til út á várið.

### - Fígging
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Síðani arbeiðið fór í gongd og fram til ársenda 2002 eru nýttar 181 mió kr av játtaðu byggifíggingini. Endaliga fíggingin verður fyrireikað í løtuni og skal vera fingin uppá pláss áðrenn árið er úti.

### - Nýtslugjald, ferðsla og gjaldstøð
Felagið hevur ásett nýtslugjaldið við atliti til væntaðu ferðslunøgdina, sparingar hjá einstøku ferðabólkunum og neyðugu inntøkuna. Stórur almennur áhugi var í ásetingini av nýtslugjaldinum. Nakað av óvissu tók seg upp um hagtalsgrundarlagið frá ferjusiglingini. Felagið ásetti tí eitt gjald svarandi til eina varisliga meting, men lat samstundis ein byrjunaravsláttur í tíðini til 1. apríl 2003, tá ið tunnilin hevði verið í nýtslu eina tíð. Byrjunaravslátturin var gjørdur varandi og ein eykaavsláttur var lagdur afturat, sum kom í gildi fyrst í apríl 2003.

Ferðslan í tunlinum hevur síðani upplatingardagin verið munandi størri enn væntað. Hagtalsgrundarlagið bendið á, at ferðslan varisliga mett kundi gerast 400 akfør/dag. Nú ferðsla hevur verið í umleið 6 mánaðar, hevur ferðslan ligið um 800 akfør/dag og upp í 1000 akfør/dag.

Innkrevjingarskipanin, sum fevnir um hald og kortgjalding/ferðaseðlar, hevur verið trupul at fáa at rigga eftir ætlan. Haldini virka nú eftir ætlan, men trupulleikar eru enn við kortgjalding. Gjaldstøðin, sum eftir ætlan skal vera ómannað, hevur tí enn manning. Arbeitt verður støðugt við at fáa skipanina at rigga til fulnar.

**- Heilsa, trygd og umhvørvi**
Arbeiðið við tilbúgvingarætlan fyri Vágatunnilin er hildið fram saman við løgregluni, Landsverkfrøðinginum, Kvívíkar kommunu og Sandavágs kommunu. Til arbeiðið er knýttur ráðgevi við tilbúgvingarligum førleika. Váðagreining er gjørd, ið lýsir møguligar vandar, teirra sannlíkindi og fyribyrgjandi tiltøk.

Tað vísti seg, at tað komu fleiri óvæntaði krøv til sløkkiútgerð og trygdarútgerð í mun til tað, sum fyrr hevur verið kent í føroyskum tunlum. Hesi krøv hava ført við sær nakað av eykakostnaði fyri felagið. Felagið hevur tó ikki viljað slakað uppá trygdina og hevur luttikið í drúgva arbeiðinum við at finna fram til hóskandi útgerð til sløkkiliðini. Somuleiðis hevur felagið luttikið í at gjalda útveganarkostnaðin av neyðugari eykaútgerð hjá sløkkiliðunum. Krøvini til trygdarútgerð í tunlinum sambært endurskoðaða tunnilsnormalinum eru uppfylt. Eisini hevur felagið havt ein virknan leiklut í at skipa fyri venjingum og skeiðum fyri tilbúgvingarfólki.

**- Hátíðarhald**
Í sambandi við at tunnilin varð latin upp fyri ferðslu, var hátíðarhald týsdagin 10. dec 2002.

Ternan sigldi seinasta túrin av Vestmanna við gestum og ferðafólki, fylgd av bátinum Ólavur, sum røkti sigling um Vestmannasund í mong ár. Á Oyrargjógv varð Ternan móttikin av hornorkestri og væl av fólki. Av Oyrargjógv koyrdu ellisakfør við innbodnum gestum niðan til vegamótið oman fyri Fútaklett har skrúðgongan vaks við skúlabørnum og áskoðarum, sum fór út til Kálvadalsá, har sjálvt hátíðarhaldið fór fram.

Undir hátíðarhaldinum við tunnilsmunnan framførdi hornorkestur úr Vágunum og Vestmanna, eins og Vágakórið og Vestmanna sangkór, verk, sum vóru gjørd til høvið. Eisini luttók barnakór við sangi. Dávid Reinert Hansen, stjóri í felagnum bjóðaði vælkomin. Røður vóru frambornar av Klæmint Weihe, nevndarformanni, Bjarni Djurholm, landstýrismanni og Jónhild Jørgensen formanni í felagskommununi.

Tá ið Bjarni Djurholm, landstýrismaður hevði skorið snórin við gjaldstøðina av, og tunnilin har við var opin fyri ferðslu, koyrdi bilafylgið av ellisakførum, við løgmanni á odda, gjøgnum tunnilin til rundkoyringina í Leynum og hátíðarhaldið var av.

Um kvøldið var døgurði fyri innbodnum í høllini á Giljanesi, eins og Vágoyggin í síni heild frøddist um fasta sambandið um Vestmannasund við veitslum, tiltøkum og annað mangt.

Upplatingardagin og dagin eftir var opið fyri ferðslu, uttan at nýtslugjald var kravt.

**3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi**
Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina. Sum ásett í anlegslógini er felagnum játtað tilsamans 160,3 mió kr ella 20 mió kr um árið til verkætlanina. Verkætlanin er ein tann størsta á samferðsluøkinum seinastu árini.

Ein uppgerð av nýttu arbeiðstímunum við árslok 2001 vísti, at 59% av tímunum vóru arbeiddir av fólki búsitandi í Føroyum meðan 41% vóru arbeiddir av fólki búsitandi uttan fyri Føroyar. Í hesum tølum eru eisini undirveitarar roknaðir uppí. Arbeiðið, sum er framt í 2002 hevur nakað sama býti.

**4. Rakstrar og íløguætlan fyri komandi árini**
Rakstrarútreiðslurnar av felagnum hava í byggitíðini verið o.u. 1,5-2,0 mió kr um árið. Rakstrar-útreiðslurnar av felagnum, nú latið er upp fyri ferðslu, eru mettar til 7-8 mió kr um árið, væntast má, at útreiðslunar fyrstu tíðina vera nakað hægri, inntil allar skipanir eru fingnar at rigga eftir ætlan.

Tunnilsarbeiðið hevur verið framt skjótari enn upprunaliga mett. Íløgurnar í 2002 hava verið 122 mió kr. Støðisognin er við árslok uml. 275 mió kr. Íløgurnar í 2003 eru mettar til uml 10-15 mió kr.

Upprunaligi planleggingarkostnaðurin fyri Vágatunnilin var 240 mió kr, umframt fyrireikingar og forkanningar, prísvøkstur, broytingar og rentu í byggitíðini. Samlaði kostnaðurin av hesum postum hevur til og við 2002 verið 35 mió kr. Størstu broytingarnar stava frá meirkostnaði og prísvøkstri til asfaltering, trygdarútgerð og tilbúgving, vatntetting og teking og útreiðslum til rentu í byggitíðini.

Væntandi verða seinastu snøklarnir av byggiarbeiðinum lidnir í summar, soleiðis at felagið, tá ið komið er út á heystið, er rakstarfelag burturav. Nevndin hevur sett sær fyri at fáa raksturin í fasta legu við atliti til at fáa hann so smidligan og bíligan sum møguligt.

Tórshavn 26. juni 2003

| | |
|---|---|
| Klæmint Weihe, form. | Bergur í Garði, næstform. |
| Jens Kári Vilhelm | Heri M. Hammer |

Oyvindur Brimnes